**Fiskimálaráðið**
*Fiskiveiðieftirlitið*

# Fulltrúi

Starv sum fulltrúi á Fiskivinnustovuni verður hervið lýst leyst til setan skjótast gjørligt.

Fiskivinnustovan er skipað sum deild í Fiskimálaráðnum.

**Starvið inniber m.a. hesar uppgávur:**
1) Hava um hendi umsitingina av fiskiídnaðarmálum
2) Hava um hendi umsitingina av fiskivinnuroyndum
3) Samskipa leiklutin hjá Fiskimálaráðnum í verkætlanum innan fiskivinnugransking
4) Samstarv við leiðslu og aðrar fulltrúar í Fiskimálaráðnum um tvørgangandi uppgávur innan fiskivinnumál

**Førleikakrøv:**
1) Viðkomandi útbúgving frá hægri lærustovni
2) Góð evni at samskifta á føroyskum, norðurlendskum enskum máli
3) Vera til reiðar til at royna nýggjar avbjóðingar
4) Kunna virka til lítar og á ein tryggan hátt í einum umhvørvi, har mál til tíðir hava nógvan skund
5) Góðan førleika at arbeiða sjálvstøðugt
6) Góð samstarvsevni

Grundleggjandi royndir innan virkisøkini er ein fyrimunur

**Setanartreytir:**
Starvið verður lønt sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Setanarøkið fevnir um Fiskimálaráðið og stovnar/deildir undir tí, umframt hini aðalstýrini og Løgmansskrivstovuna. Tænastustaðurin í løtuni er Fiskivinnustovan.

Tann, ið settur verður, má kunna tola broytingar í virkisøkinum og at økið verður umskipað til eisini at fevna um aðrar uppgávur í Fiskimálaráðnum.

**Umsóknir:**
Umsóknir saman við avriti av prógvum og møguligum viðmælum, skulu vera Fiskivinnustovni í hendi í seinasta lagi 4. apríl 2003 kl. 16.00.

Umsóknir skulu sendast til:

**Fiskimálaaráðið**
att.: Fiskivinnustovan
Postsmoga 347
110 Tórshavn

Fyrispurningar starvinum viðvíkjandi kunnu setast Andras Kristiansen, deildarstjóra á telefon 353030.

**LØGMANSSKRIVSTOVAN**

# Starvslesandi í London og Brússel
**(Stagiaire)**

Søkt verður eftir lesandi til ávikavist sendistovu Føroya í Bretlandi (London) og sendistovu Føroya í Evropasamveldinum (Brússel). Starvstíðin er frá september 2003 til februar 2004 ella fyri lestrarhálvárið.

**Uppgávur**
Tann starvslesandi verður partur av dagligu arbeiðsgongdini á avvarðandi sendistovu, serliga við atliti at samskifti viðvíkjandi handli og fiskivinnu.

**Førleikakrøv**
Tann starvslesandi eigur at vera lesandi føroyingur við hægri háskúla, sum í minsta lagi hevur útbúgving á *bachelor* stigi.

Umsøkjarar eiga at hava góð samstarvsevni, vera áhitnir, miðvísir, kunna arbeiða sjálvstøðugt og vera til reiðar at royna nýggjar avbjóðingar. Umsøkjarar eiga harumframt at vera stinnir í føroyskum og enskum máli.

**Starvsstaðið**
Starvsstaðið verður ávikavist Sendistova Føroya í Bretlandi, 55 Sloane Street, London SW1X SR ella Sendistova Føroya í Evropasamveldinum, Rue d'Arlon 69, B-1040 Brussels. Sendistovurnar eru skipanarliga samrunnin partar av Løgmansskrivstovuni.

**Setanartreytir**
Størvini eru skipað eftir teim reglum, ið eru galdandi fyri starvslesandi á staðnum og er ólønt; men viðbót verður latin eftir nøktandi uppihald. Møguleiki er at søkja um ferðastuðul frá Stuðulsstovninum. Stuðul verður veittur til bústaðarútreiðslur.

Nærri upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til Herluf Sigvaldsson, deildarstjóra í uttanríkisdeildini á Løgmansskrivstovuni, tlf. 351010, ella til John Rajani, sendimann í London, tlf. +44 (0)20 7333 0227 ella til Hákun J. Djurhuus, sendimann í Brússel, tlf + 32 (2) 233 08 55.

**Umsóknir**
Umsóknir, prógv, c.v. og viðmæli verða at senda

**Løgmansskrivstovuni**
Tinganesi
FO-100 Tórshavn
Telefax +298 35 10 15 t-postur: info@tinganes.fo

og skulu vera Løgmansskrivstovuni í hendi í seinasta lagi mikudagin 9. apríl 2003.

*Løgmansskrivstovan er fyrisiting hjá løgmanni. Hon fevnir millum annað um uttanríkistænastuna við uttanríkisdeild og sendistovum í ávikavist Bretlandi, Danmark og Evropasamveldinum og situr fyri málum, ið eru løgd til løgmann sambært stýrisskipan Føroya umframt uttanríkismálum.*

# BILSKROKK
*Lakkering & Plátuverkstaður*



Vit taka okkum av øllum skaðum sum t.d. tryggingarskaðum, buglum, lakering, rusti og mongum øðrum.

TLF. 32 24 71 - 21 24 71
Sláttanesgøta 9 - Boks 2227 - Fo-110 Tórshavn






# Gravimaskina til sølu

Lítil gravimaskina (sokallaður eiturkoppur), Euromach Super Jolly-1300, frá 1991 til sølu fyri hægsta, hóskandi boð.

Verður seld í tí standi, hon er í nú. Kontant gjald.

Maskinan kann sýnast á Gróðurstøðini, Hvítanesvegi 3, Hoyvík.

Nærri upplýsingar fáast hjá Martini Petersen, røktarleiðara, fartlf. 210944.

Skrivlig bóð skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi mánadagin 31. mars 2003.

**Skógrøkt Landsins**
Hvítanesvegur 3, Hoyvík · Postrúm 1174
110 Tórshavn · Telf. 310922 · telefaks 310944
teldupostur: skogroktin@skogroktin.fo

# Team missiónin í Evangeliihúsinum

## og Youth With a Missión v/ Sannu Hammer luttaka

fríggjakvøldið kl. 20 í Café One Way á Tvøroyri.

Leygarkvøldið kl. 20 á ungdómsmøtinum í Missiónshúsinum á Tvøroyri og í Café One Way aftaná ungdómsmøti.

Sunnudagin kl. 11 og 18 luttaka tey á møtinum í Sion í Vági.

**Team missiónin í Evangeliihúsinum og Youth with á missión**

**MASKINMEISTARAFELAGIÐ**

# Aðalfundur

Maskinmeistarafelagið hevur ársaðalfund á Hotel Hafnia
**í dag 15. mars kl. 14.00.**

Skrá sambært lógini.

**Nevndin**

# Bingjur til sølu

Vit hava nakrar 20 fóts bingjur til sølu.

**Landshandilin**
**tlf. 311385**

**Postverk Føroya**

# Frítíðaravloysarar m/k

**Posthúsið og Girostovan í Tórshavn søkja við hesum eftir frítíðaravloysarum m/k til**

- **Postútbering**
  - arbeiðið byrjar klokkan 06.00
- **Postskiljing**
  - vaktarskifti millum klokkan 04.00 og 22.00
- **Postkoyring**
  - vaktarskifti millum klokkan 05.30 og 21.00
  - stóra koyrikortið er ein fyrimunur/treyt
- **Skrivstovuarbeiði**
  - vaktarskifti millum klokkan 08.00 og 19.00

**Roknast kann við at arbeiðið verður í tíðini 1. mai — 30. september. Talan kann eisini verða um styttri tíðarskeið.**

Postverkið ynskir av tær, at tú ert álítandi, ágrýtin, stundislig/ur og positiv/ur.
Lønin verður eftir sáttmála millum Føroya Landsstýri og Føroya Postfelag.
Hevur hetta tín áhuga, so send skjótast gjørligt og í seinasta lagi 5. apríl skrivliga umsókn við møguligum prógvum/viðmælum til:

**Postverk Føroya**
**Postboks 3009**
**110 Tórshavn**

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# Mentanarstuðul
## frá mentamálanevnd Tórshavnar býráðs

2 ferðir um árið, um várið og um heystið, er møguleiki at søkja um stuðul frá mentamálanevndini.

Stuðulin verður veittur einstaklingum og feløgum í kommununi til tiltøk, ið verða hildin at hava týdning fyri mentanarlív kommununnar.

Fyri at fáa stuðul, skal vera sýnt í verki, at álvara er aftan fyri tiltakið.

Grundgevast skal fyri umsóknini, og eigur fíggjarætlan/roknskapur at fylgja við umsóknini, so metast kann um studningstørvin hjá viðkomandi felagi, luttakara ella persóni.

Meiri fæst at vita um stuðulin frá Jákupi Simonsen, deildarleiðara, á trivnaðarfyrisitingini, tlf. 31 51 60.

Umsóknir skulu vera Tórshavnar kommunu í hendi í seinasta lagi 7. apríl 2003. Merk umsóknina "Mentanarstuðul".

SNARSKIVAN

Søkt verður eftir

# LÆRLINGI Í SALTANGARÁ

**at byrja sum skjótast**

**Læran umfatar:** Samskifti við viðskiftafólk, sølu og annað fyrifallandi handilsarbeiði

**Vit vænta:** at tú ert sjálvstøðug/ur, arbeiðssom/samur, røkin, fyrikomandi og hevur hug og hegni til at veita kundum okkara eina góða tænastu.

Tað er ein treyt, at tú hevur FHS.

Skrivlig umsókn skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 21. mars 2003

Sendast til:

**P/F Hjá Fróða**
Yviri við Strond 3 · Postboks 1336 · FO-110 Tórshavn
tel 310808 · fax 314676 · frode@post.olivant.fo · www.hjafroda.fo

Dámar tær væl
at fáast við hár ella smyrsl
- so er hettar kanska
nakað fyri teg.

Skúlin tekur bara 2 ár.
Tú er vælkomin at senda
eina umsókn sum skjótast.



Tann Føroyski
Hárfríðkanarskúlin
Postboks 1047
FO-110 Tórshavn
Tel. 262537 ella
Tel. 311683 eftir kl. 20.00

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# Kunngerð

Sambært gr. 6 í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir verður við hesum gjørt kunnugt, at Tórshavnar býráð á fundi 19. desember 2002 samtykti broytingar í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

Ætlaða broytingin er, viðv. ásetingum fyri bilskúr og bilskýli í kap. IV, § 24 Greiningar og útrokning av nýtslustigum o.a. og §25 Viðvíkjandi hæddar- og frástøðuviðurskiftum húsanna.

Tilfar, sum lýsir broytingina, liggur frammi í Snarskivuni á Vaglinum frá mánadegi 17. mars til og við 7. apríl 2003. Upplatingartíðirnar hjá Snarskivuni eru mánadag til fríggjadag frá kl. 9.00 til kl. 16.00, hósdag tó til kl. 18.00.

Møgulig mótmæli ella broytingaruppskot skulu sendast Tórshavnar kommunu skrivliga í seinasta lagi 17. juni 2003.

SNARSKIVAN